FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

Argir tann 14. januar 2011
**Journal nr. 6345-0047/2011\ 3**

**Løgtingið**

**Løgtingsmál nr. xx/2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kommunustýri**

**Uppskot**
**til**
**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kommunustýri**

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 6. mai 2003, verður gjørd henda broyting:

1) Í § 54 eftir stk. 1 verður sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 2.* Er bruttoskuldin hjá kommununi meira enn 1,2 álíkningar, sbr. § 43, stk. 2, kann landsstýrismaðurin geva kommunustýrinum boð um at nýta fíggjarognir at rinda niður skuld."
Stk. 2 verður hereftir stk. 3.

2) Í § 47 verður aftaná "ársroknskap," sett: "uppgerð av skuld í mun til álíkning,".

**§ 2.**
Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Kap. 1. Almennar viðmerkingar**
Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum mælir við hesum til at gera broytingar í løgtingslóg um kommunstýri. Mælt verður til at áseta, at landsstýrismaðurin kann geva kommunustýrinum boð um at nýta fíggjarognir at rinda niður skuld um bruttoskuldin hjá kommununi er meira enn 1,2 álíkningar.

Í verandi kommunustýrislóg hevur landsstýrismaðurin heimild í § 54 stk. 1 at áleggja kommunum við nettoskuld hægri enn eina álíkning at gera broytingar í uppskoti til fíggjarætlan, fíggjarætlan ella eykajáttan. Tann heimildin er tó einans viðvíkjandi nettoskuld hjá kommunum, og sum part av tí at hava tryggar og javnar fíggjarkarmar hjá

Kvíggjartún 1 • Postsmoga 2039 • 165 Argir
Telefon 35 20 20 • Telefax 35 20 25 • E-mail: fmr@fmr.fo

kommununum er eisini neyðugt at seta avmarkingar fyri hvussu stóra bruttoskuld kommunur kunnu hava. Við hesum uppskoti til løgtingslóg verður tílíkt mark ásett.

Harafturat er í uppskoti at landsstýrismaðurin heimild at áseta nærri reglur fyri hvussu skuld (netto og brutto) verður gjørd upp í mun til álíkning.

**Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum**
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri landið**.**

Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri landið.

Uppskotið hevur við sær fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur (Avmarking fyri bruttoskuld).

Uppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

Uppskotið hevur ikki við sær umhvørvisligar avleiðingar.

Uppskotið hevur ikki við sær serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

Uppskotið hevur ikki við sær sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

Uppskotið er ikki tengt at millumtjóða sáttmála.

| | Fyri landið/lands-myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar sam-felagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Nei | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Nei | Nei |

**Kap. 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**
Til nr. 1
Við hesi áseting fær landsstýrismaðurin heimild at áleggja kommunum at nýta fíggjarognir at rinda niður skuld. Heimildin er galdandi um bruttoskuldin hjá kommununi er omanfyri 1,2 álíkningar. Álíkningin verður til nýtslu eftir hesi grein

verður roknað út frá § 43 stk. 2. Heimildin er óheft av um nettoskuldin hjá kommununi er omanfyri ella undir einari álíkning.
Í mun til § 54 stk. 1 kann heimildin í hesi grein ikki nýtast til at áleggja kommunum útreiðslu- ella inntøkubroytingar, men einans at áleggja kommunum at nýta fíggjarognir at minka um skuld, t.e. at áleggja kommunum at minka um javnan á fíggjarstøðuni.

Til nr. 2
Verandi regluverk í mun til uppgerð av skuld í mun til álíkning hevur verið grundað á tulking av § 43 stk. 2 og serligu viðmerking til hesa í upprunaliga løgtingslógaruppskotinum. Við hesari broyting í § 47 fær landsstýrismaðurin heimild at áseta nærri reglur um hvussu netto- og bruttoskuld verða gjørd upp í mun til álíkning. Broytingin fer gera, at tað fer at bera til at uppgera brutto- og nettoskuld (herí eventualskyldur) upp, so at hesi betri eru í tráð við nýggja kommunala roknskaparverkið, ið framt er.

**Til § 3**
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 14. januar 2011

**Jóannes Eidesgaard**
landsstýrismaður

/Petur Alberg Lamhauge